Ung í Føroyum 2005:

# Ung listafólk á veg ...

**- Tað, vit vaksnu ganga og halda er í hæddini millum tey ungu beint nú, er sum oftast gomul tíðindi hjá teimum ungu. Tankin við Ung í Føroyum er at lata tey ungu sjálvi vísa okkum sína útgávu av ungdómsmentanini, siga fyriskiparnir á Ung í Føroyum, Rakel Helmsdal og Hedvig Westerlund Kapnas**

UNG LIST

*Ragnfríð K. Jacobsen*
*Anna V. Ellingsgaard*

- Tey ungu koma við hugskotunum, og vit geva teimum møguleikan at gera tey til veruleika saman við dugnaligum vegleiðarum. Tað er í stuttum tankin við hesi stevnini. Men tað merkir so eisini, at hon fyrst og fremst vendir sær til ung, ið hava eitt sindur av royndum við tí listarliga ítrívinum, tey fáast við. Ung í Føroyum er til dømis ikki staðið, har tú lærir at lesa nótar. Tað máist tú duga frammanundan, sigur Rakel Helmsdal.

Hóast tankin við tiltakinum er tann sami, var arbeiðsháttturin eitt sindur broyttur, nú Ung í Føroyum 2005 fór av bakkastokki í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um vikuskiftið. Hesuferð bleiv ikki endað við eini stórari felags framførslu, sum hini árini. Í staðin byrjaðu dagarnir við 10 smáum framførslum av ymsum, sum tey ungu sjálvi høvdu fingist við frammanundan og kanska lagt seinastu hond á seinnapartin fríggjadagin.

- Vit hava valt at gera tað uppá hendan mátan framyvir, tí so verður ikki so nógv orka brúkt uppá at hugsa um, at eitt úrslit má spyrjast burturúr. Vit vilja heldur lata tey ungu sleppa at brúka tíðina uppá tað kreativa arbeiði heldur enn at skula avrika nakað ávíst, sigur Rakel.



*Higartil eru Rakel og Hedvig avbera væl nøgdar við nýggju og víðkaðu útgávuna av Ung í Føroyum*

### Frálíkir karmar

Vælumtókta tiltakið Ung í Føroyum hevur alsamt vundið uppá seg seinastu árini, og tí hava fyriskiparnir valt at víðka tiltakið. Sum tey flestu minnast, var Ung í Føroyum fyrr í Norðurlandahúsinum men bert annaðhvørt ár, har eini 60 luttakarar sluppu við. Framyvir verða dagarnir hildnir ymsa staðni í Føroyum í trimum umførum, so at tað í alt sleppa eini 120 luttakarar við hvørt ár. At tiltakið hesuferð var í Fuglafirði kom mest sum av sær sjálvum siga fyriskiparnir.

- Fuglafjarðar Kommuna er vorðin ein fyrimynd fyri okkum øll, tá tað ræður um at fjálga um og stimbra mentanarligt virksemi. Allur hugburðurin her í bygdini mótvegis mentanini er so positivur, at tað var upplagt at koma her við tiltakinum, siga Rakel og Hedvig og leggja afturat, at tað eisini hevði nógv at siga, at karmarnir fyri tiltakinum eru so góðir, sum teir eru í Fuglafirði.

- Hetta er fyrst ferð við royna okkum við Ung í Føroyum aðrastaðni enn í Norðurlandahúsinum, og tí var tað umráðandi fyri okkum at koma so væl frá byrjan, sum møguligt. Her hava vit í øllum førum ikki umstøðurnar at skylda uppá, um okkurt kiksar, siga tær báðar, sum higartil eru avbera væl nøgdar við Ung í Føroyum í nýggja haminum.

## Michelangelo í Mentanarhúsinum



Á verksmiðjuni hjá ungu myndlistafólkunum vóru tey í ferð við at mála eina veggmynd ella sokallaðan "fresco" málning. Oggi Lamhauge, vegleiðari, greiddi frá, at teir gomlu frescomeistarnir, til dømis Michelangelo, blandaðu litirnar upp í sparslið, sum síðani varð sparslað beinleiðis á veggin — ofta í kirkjum og øðrum stórum bygningum. Hetta var eitt øgiliga tíðarkrevjandi arbeiði, so hesuferð brúktu luttakarnir moderna tilfar fyri at tað skuldi ganga skjótari. Tey høvdu sjálvi valt motivini, sum tey síðani sluppu at málað beinleiðis á veggin í einum rúmi uppi á loftinum í Mentanarhúsinum.

### Byrjan til listakarrieru?

Hanna Jacobsen hevur aldrin málað fyrr enn nú á Ung í Føroyum stevnuni, men hon hevur altíð teknað nógv. Síðani hon var heilt lítil, hevur hon sitið við blýantinum og teknað.

Hanna meldaði seg til tiltakið fyri at fáa eitt upplivilsi, og fyri at læra at mála. Henni dámar sera væl at vera við í tiltakinum, og hon hevur lært ótrúliga nógv. Hvussu man málar, hvussu man ger tær røttu strikurnar, velur røttu farvurnar, hvar skuggarnir skula vera, og hvønn veg teir fara, o.s.fr.

- Kanska tað, sum eg læri her, kann verða ein byrjan upp á eina listarliga karrieru, sigur Hanna smílandi. Hon og tvær aðrar gentur avgjørdu at mála tey fýra elementini: Jørð, luft, eld og vatn. Men í staðin fyri at bara mála jørð, luft, eldur og vatn, málaðu tær eitt konufólk saman við elementinum, so at tað bleiv meira áhugavert. Og tað lukkaðist sera væl hjá teimum.

- Stemningurin var sera góður inni í bólkinum, hugnaligur og festligur, sigur Hanna, sum nú er 18 ár og sostatt tíverri ikki kann vera við næsta ár.

Fríggjadagin hongdu myndlistafólkini eina myndaframsýning upp í Ribarhúsi, sum verður hangandi alla hesa vikuna.











